# Hess tveir brunnar í ár

**So skjótt Amerda Hess er liðug við boringina við markið, sum skjótt er eina viku gomul, fer West Navion at seta enn eitt hol á undirgrundina, longur norðuri.**

**Eisini tann brunnurin kann fáa stóran týdning fyri Føroyaøki.**




*Brunnur nr. 6004/16-1, har týðandi nøgdir av kolvetnum vórðu staðfest í fjør. Nú skal brunnur hinumegin markið avgera, um talan veruliga er um eitt stórt lønandi fund.*

OLJULEITING
*Jan Müller*

Vil væl til verður meira enn tann eina boringin við føroyska markið í ár. West Navion, sum borar ein avmarkingarbrunn fyri The Faroes Partnership samtakið, fer at bora enn ein brunn, tá hesin fyrri er liðugt boraður. Talan er um ein kanningarbrunn í Cambo-prospektinum, ið liggur í loyvinum 204/9 og 10, væl longur norðuri. Ben Arabo, stjóri hjá Amerada Hess í Føroyum váttar, at teir eisini ætla at bora Cambo-brunnin í ár. Hóast hesin brunnur eisini er í bretskum øki, so hevur hann kortini stóran týdning og áhuga fyri oljufeløgini, sum leita eftir olju á føroyska landgrunninum. Cambo er skamt frá markinum og tætt við 9-ára loyvið hjá Agip. Tað er greitt, at henda boringin tí vil hava stóran áhuga fyri eitt nú Agip. Men hon vil eisini hava áhuga fyri føroyskar myndugleikar, nú teir skjótt skulu til at seta út í kortið enn eina útbjóðing. Ikki er ósannlíkt, at úrslitið av hesi boringini kann ávirka, hvørji øki Oljumálaráðið fer at peika út til 2. útbjóðingarumfar.




*Kortið sýnir 1. útbjóðing á føroyskum øki. Krossarnir bretsku megin markið vísa verandi boring hjá Hess (tann syðri) og Cambobrunnin, sum Hess fer at bora í oktober ella november (norðari).*

The Faroes Partnership skal bora enn ein brunn í bretskum øki. Tað er Bedlington prosepektið, sum liggur í teiginum 204/21 ella ikki so langt frá tí brunninum, sum West Navion borar í teiginum 204/16 heilt tætt við markið júst í hesi løtu. Sum skilst er eingin endalig avgerð tikin, nær hesin triði brunnurin hjá Hess við markið skal borast.

# Fleiri brunnar við markið næsta ár




*Kortið sýnir loyvini í bretskum øki frá seinastu útbjóðing. Í ár og serliga næsta ár verða fleiri brunnar boraðir beint við markið.*

**Øll eygu eru vend móti Hess-brunninum, sum West Navion borar í løtuni. Fleiri brunnar skulu borast í bretskum øki í næstu framtíð, tætt upp at markinum. Hesir kunnu fáa stóran týdning fyri gongdina á landgrunninum**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Av tí at jarðfrøðin ikki kennur nøkur politisk mørk, so er greitt, at brunnar, sum verða boraðir í bretskum øki nær okkara marki kunnu eisini fáa avgerandi týdning fyri leiting á føroyska landgrunninum. Hetta er brunnurin, sum Hess borar í løtuni eitt gott dømi um, umframt teir báðar brunnarnar tað skal til at bora aftrat í ár og næsta ár við markið.

Men tað eru eisini onnur feløg, sum hava fingið tillutað teigar tætt upp at føroyska markinum. BP fekk tillutað 204/18, sum mong hildu vera tann besta blokkin við markið. Men boringin har í fjør, Assynt,

*Framhald á síðu 13*



*Framhald av síðu 12*

gav jú einki úrslit. BP hevur tó bundið seg til at bora fleiri brunnar í hesum teiginum.

Enn eitt stórt oljufelag ChevronTexaco skal bora nakrar kanningarbrunnar í bretskum øki nærhendis føroyska markinum. Felagið fekk fleiri blokkar tillutaðar í 19. útbjóðingini, sum allir liggja heilt uppat føroyskum øki. Sambart blaðnum Deepwater Technology hevur ChevronTexaco kannað dagraturnar fyri ein brunn og option fyri einum øðrum í teiginum 204/17 í bretskum øki, skamt frá markinum. Hesin brunnurin skuldi eftir ætlan borast í hesum ársfjórðinginum. Eisini hesin brunnurin kann hava stóran týdning fyri komandi boring í 6-ára loyvinum hjá Agip við Føroyar. Tí hann er stutt frá staðnum, har Agip næsta summar fer at bora sín fyrsta brunn á føroyskum øki.

Sosialurin fræ私ir tó av skrivstovuni hjá Chevron Texaco í Aberdeen, at tey hava avgjørt at bíða við hesi boringini til næsta summar. Vit spurdu eisini um tað er uppá tal at "farma" inn í lisensir á føroyskum øki, t.d. tann hjá Agip, men tað hava tey onga viðmerking til í løtuni. –Spyrjið aftur um ársskiftið og vit hava tá møguliga nakað at siga um okkara ætlanir á Atlantsmótinum er svarið frá talskvinnuni hjá Chevron Texaco. Ein orsøkin til, at nettupp hetta oljufelagið er áhugavert fyri føroyingar er tann, at felagið royndi at fáa loyvi í 1. útbjóðing á landgrunninum. Men tað varð ov stutt. Nú tað hevur fingið fleiri lovandi teigar í bretskum øki við markið ístaðin má metast, at felagið, sum síðani er lagt saman við tí stóra Chevron, framhaldandi hevur eyguni við Føroyaøkinum.

Hyggja vit nærri at kortinum sæst, at teigurin 204/17 liggur beint yvirav loyvinum hjá Agip 002. Keldur í oljuverðini blaðið hevur tosað við siga, at tað er ikki heilt ósannlíkt, at møguligt oljufelt gongur tvørtur um markið eins støðan er beint í grannablokkunum, sum Hess stendur fyri. Um so er, at Agip ger eitt fund næsta summar og hetta gongur inn á bretskt øki í teiginum hjá ChevronTexaco kann tað hugast, at eitt samstarv teirra millum verður aktuelt – ella hvør veit, at feløgini tá kunnu "farma" inn hjá hvørjum øðrum. Hetta er tó heilt óvist siga keldur við blaðið. Men tað er so ein møguleiki, sum ikki kann síggjast burtur frá.

Fara vit nú longur norður fram við markinum, so hevur ChevronTexaco eisini teigar har, 213/5 og 214/1. Hetta er eisini eitt fyri Føroyar áhugavert øki, tí tað verður hildið, at stórir strukturar, sum kunnu goyma gass, liggja undir basaltinum inni á føroyska landgrunninum.

Nú vit hava nevnt komandi boringar í bretskum øki nær markinum hjá Hess, BP og Chevron Texaco restar í at nevna enn eina áhugaverda boring. Tað er PhillipsConoco, sum situr á teiginum 176/25, sunnan fyri Gullhornið. Í hesum samtakinum eru eisini Statoil, Shell (fyrr Enterprice) og Petro Canada (fyrr Veba). Eftir øllum at døma bíða Phillip Conoco eftir úrslitinum av tí brunni, sum Hess borar beint nærhendis. Tað sama gera uttan iva eisini ChevronTexaco og BP.

Samanumtikið kann sigast, at hóast ongar boringar eru á føroyskum øki í løtuni, so vilja teir brunnar, sum verða boraðir hinumegin markið, eisini fáa stóran týdning fyri leitingini á okkara landgrunni. Møgulig fund kunnu gevar nýggjar upplýsingar um okkara øki, tey kunnu gera tað uppaftur meira áhugavert fyri oljufeløgini at bora føroysku megin markið, og tey kunnu eisini gera, at oljufeløg, sum ikki eru við í Føroyaøkinum í dag, vilja hava betri hug til at farma inn í loyvi hjá feløgunum, sum eru her í løtuni. Hetta kann eitt nú fáa stóran týdning fyri brunnin hjá Agip og Føroya Kolvetni. Spenningurin er stórur á Atlantsmótinum í løtuni, og tað er neyvan ov nógv sagt, at øll eygu eru vend móti brunninum hjá The Faroes Partnership við markið.

# Helst økt samstarv millum Føroyar og Noreg

**-Higartil hevur oljuvirksemið við Føroyar mest ment samstarvið við Skotland. Men stjórin í Atlantsflogi ivast ikki í, at avgerðin hjá Statoil at flyta sítt Føroyakontór úr London til Stavanger fer at skunda undir samvinnuna og samskiftið við norska oljustaðin**



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog og formaður í Oljuvinnufelagnum vitjar á høvuðsstøðini hjá Statoil í Stavanger saman við øðrum føroyingum, sum eru á oljumessu. Her tosar hann við fyrrverandi oddamannin fyri leitingini hjá Statoil í Føroyum, Jon Inderhaug*

*Mynd Jan*

SAMSTARV OG OLJA
*Jan Müller*

Nú nógv oljufólk og journalistar úr allari verðini hittast í Stavanger koma tey flestu við flogfari. Sosialurin hevur tosað við nøkur teirra, sum eru rættiliga kløkk at hoyra, at tað verður flogið beinleiðis millum Føroyar og Stavanger. Ein av myndamonnunum hjá Stavanger Aftenblad spyr, hví tað verður dult sum mansmorð, at Atlantic Airways hevur eina rutu millum Føroyar og Stavanger. Hann sigur, at mong fólk kenna ikki hesa rutuna og skulu tey fara til Føroya fara tey antin um Keypmannahavn ella til Bergern og víðari við Norrønu. Tey vita einki um hesa nýggju rutuna sigur myndamaðurin á norska blaðnum, sum sjálvur hevur verið í Føroyum uttan at hava hoyrt um rutuna.

Vit hava spurt Magna Arge, stjóra í Atlantsflog, um teir gera ov lítið við at upplýsa um hesa rutuna!

Hann sigur, at tað er avmarkað, hvussu stór átøk ein kann gera, tá man hevur so avmarkaða flúgving sum hesa. Í ár er hon avmarkað til bert einar 12 flogferðir í summar. Tað hevur víst seg at vera rættiliga tungt at koma ígjøgnum í Norra. Tey hava brúkt rættiliga fittar upphæddir til hetta í fjør og fyrraárið uttan at tað gav nakað serligt úrslit, men síðani tey fóru at flúgva uppá Oslo eisini tvs. eina rutu beinleiðis til Oslo leygardag og umvegis Stavanger til Oslo mikudag er ferðslan vaksin munandi. Magni Arge sigur víðari, at tað er so stór spjaðing í trafikkinum í Norra, har Oslo er so stórt knútapunkt, at fólk hava størri nyttu at flúgva til Oslo enn til Stavanger. -Vit hava fingið nokk so gott mót út frá tølunum fyri Osloflúgvingina. Vit fara í hvussu er at halda fram við tí sama vit hava. Tað kundi møguliga verið, at flúgvingin uppá Oslo fevndi um eitt longri tíðarskeið. Hon byrjaði sum er miðjan juni og endaði umleið 1. september.

Stjórin í Atlantsflogi, sum eisini er formaður í Oljuvinnufelagnum undir Vinnuhúsinum heldur, Stavanger verður bara áhugaverdur at flúgva til, um eitt samstarv innan oljuvinnu tekur seg upp millum Stavanger og Føroyar eins og millum Føroyar og Aberdeen. Tað hevur verið nógv meira samstarv millum Aberdeen og Føroyar enn millum Føroyar og Stavanger, og tað er helst eisini orsøkin til, at nógv meiri ferðsla er tann vegin. Operatiónirnar í Føroyum í sambandi við oljuleitingina hava í størri mun verið avgreiddar og stýrdar úr Aberdeen, og tí verður tað eitt størri trafikknútapunkt.

Ein av høvuðsorsøkunum er tann, at Statoil valdi í síni tíð at leggja Føroyaøkið undir Londonkontórið heldur enn til Stavanger.

Magni Arge heldur, at nú Statoil hevur avgjørt at flyta sítt Føroyavirksemi úr London til Stavanger, kann tað koma at broyta ymiskt. -Hyggja vit mentanarliga at hesum, so liggur tað eitt sindur lættari hjá okkum at fáast við norðbúgvar enn við bretar. Eitt nú er tað málið, og man skilur eisini betri umstøðurnar hjá hvørjum øðrum. Tí er tað náttúrligt, at tað mennist eitt samstarv í størri mun millum Føroyar og Norra enn tað hevur verið.

Men tað er í løtuni eisini ein spurningur um, at norðmenn hava nokk at gera og hyggja til sín sjálvs í hesum tíðum, meðan bretar hava verið meira svangir, nú oljuvirksemi í bretskum øki er fallandi. Harafturímóti hevur virksemi í Norra verið á rímuliga hægri støði.

Magni Arge ivast tí ikki í, at avgerðin hjá Statoil at flyta sítt Føroyakontór úr London til Stavanger fer at hava við sær, at betra um grundarlagið fyri øktari samvinnu millum Føroyar og Noreg.

## Gongst sum ætlað

OLJULEITING
*Jan Müller*

Boringin hjá West Navion skamt frá føroyska markinum gongur sum ætlað. Tey hava nú arbeitt í góða viku og frá høvuðsskrivstovuni hjá Smedv ig í Stavanger frætta vit, at tað gongst væl við at bora. Ætlandi skal West Navion bora fram til desember mánað. Tá hesin brunnurin er liðugur verður farið at bora Cambobrunnin, sum liggur nakað norðari. 117 mans er við tí stóra boriskipinum. Hjá Smedvig siga tey, at eftir hesar báðar boringarnar hevur skipið ongar aðrar uppgávur. Boringin í løtuni er framhald av tí fundinum, sum Amerada Hess gjørdi í føroyskum øki í fjør. Talan er um ein avmarkingar og metingarbrunn til føroyska fundið, sum verður mett at ganga inn á bretskt øki eisini.